

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 12 - 2011

# Føroysk oljuvinna við á Jobmatch

Føroyska oljuvinnan er eisini umboðað, tá stóra og áhugaverda tiltakið Jobmatch fer av bakkastokki í Havn klokkan 14 í dag. Talan er um ein starvsstevnu, har lesandi og fólk við útbúgving kunnu koma til óbindandi samrøðu hjá mongum ymsum føroyskum fyritøkum. Millum hesar er fleiri fyritøkur, sum hava tilknýti til oljuvinnuna her heima og burturi, eitt nú føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum. Enn ein føroysk fyritøka, sum letur sínar tænastur til altjóða oljuvinnuna er Simprentis. Aðrar fyritøkur, sum luttaka, eru t.d. Atlantic Airways, Føroya Tele, Landsverk, Bakkafrost, Elektron, Fiskaaling, NEMA, Setrið, Tórshavnar Kommuna oa. Tær luttakandi fyritøkurnar og stovnarnir á Jobmatch hava hvør sín 'bás'. Útisetar kunnu vitja básarnar fyri at frætta um møguleikar og avbjóðingar. Harumframt ber til at avtala eitt stutt 'JobPrát' við fyritøkurnar/stovnarnar. Hetta kann gerast áðrenn Jobmatch stevnuna, og útisetar kunnu bíleggja fundartíð við at fara inn á JobPrát. Sum skilst er áhugin fyri Jobmatch sera stórur. Nógvir útisetar, lesandi og fólk við útbúgving hava longu biðið um prát við onkra av teimum 21 fyritøkunum og stovnunum, sum lata dyrnar upp. Sambært heimasíðuni hjá Jobmatch tiltakinum eru meira enn 200 prát avtalað. JobMatch stevnan verður sett av borgarstjóranum í Havn, Heðin Mortensen, klokkan 14 í dag. Atlantic Petroleum Í sambandi við Jobmatch skrivar Atlantic Petroleum m.a. á Jobmatch heimasíðuna - Oljuvinnan er ein lutfallsliga nýggj vinna í føroyskum høpi, og enn er virksemið á føroyskum øki ikki so umfatandi, men væntandi er at virksemið fer at økjast sum frálíður. Við okkara luttøku á JobMatch ynskja vit at visa á, at spennandi starvsmøguleikar eru í hesi vinnu, og at kunna útisetar og onnur áhugaði um Atlantic Petroleum sum eitt gott og spennandi arbeiðspláss. Høvuðssætið hjá Atlantic Petroleum er í Tórshavn, og felagið hevur skrivstovu í London. Í løtuni starvast íalt 17 fólk í felagnum,

harav tey 7 eru føroyingar. Atlantic Petroleum hevur síðan felagið varð stovnað, bygt upp eitt netverk av føstum uttanhýsis ráðgevum, sum útvega felagnum eyka fleksibilitet, orku og førleikar. Sum felagið mennist, veksur tørvurin á at økja innanhýsis førleikan á fleiri økjum, og tí er týdningarmikið at tryggja tilgongd av vælútbúnum og virkisfúsum fólkum, føroyingum eins væl og útlendingum. Simprentis Hin føroyska oljufyritøkan, sum er við á Jobmatch, er Simprentis, ið við sínum Oilsim vøru skipar fyri skeiðum kring allan knøttin. OilSim verður brúkt á skeiðum til oljufeløg og í stórum PetroChallenge tiltøkum og sum gerandis undirvísingaramboð á miðnámsskúlum og hægri lærustovunum. Felagið hevur 15 starvsfólk og leyst atknýttar ráðgevar og skipar fyri læringstiltøkum um allan heimin. Skrivstovur eru í Føroyum, Bretlandi og Noregi, og søluumboð eru í Kanada, USA, Brasil, Fraklandi, Afrika og Malaysia. Fólkið í Simprentis hevur útbúgving og førleikar innan olju, námsfrøði, menning av ritbúnaði, umsiting og sølu. Fleiri av hinum fyritøkunum, sum eru við á Jobmatch lata eisini vørur og tænastur til olju- og frálandavinnuna, eitt nú Føroya Tele, Atlantic Airways og NEMA. Myndin vísir bygningin, har Jobmatch heldur til. Myndatøka -  Jobmatch heimasíðan.

